Dagf. 11. juni 2021
HMR J. nr. 21/10574-7

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-160/2020 eftir § 52a í tingskipanini um læknaviðurskiftini á Sandoynni, frá Páll á Reynatúgvu, løgtingsmanni

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Er landsstýrismaðurin kunnugur við, at helvtin av læknavaktini í Sandoynni verður røkt av avloysarum?
2. Er landstýrismaðurin kunnugur við, at læknar eru, sum ynskja at vera settir í fast starv í ósettu læknavaktini í Sandoynni?
3. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvør orsøk er til, og hvør grundgeving er fyri, hví lækni ikki verður settur í helvtina av læknavaktini í Sandoynni, tá tøkir læknar eru til starvið?
4.

Svar
Landsstýrismaðurin hevur fingið upplýst frá Heilsutrygd, at annar av kommunulæknunum, sum er í føstum starvi á Sandoynni, hevur ynskt at fara í farloyvi úr starvi sínum. Heilsutrygd hevur gingið umbønini hjá kommunulæknanum á møti.

Í hesum ítøkiliga førinum er talan um ein kommunulækna, sum er farin í farloyvi úr starvi sínum. Viðkomandi er ikki farin úr starvinum. Av tí, at kommunulæknin framvegis er í starvi, hóast viðkomandi er í farloyvi, er talan ikki um, at eitt kommunulæknastarv á Sandoynni er ósett.

Tað ber ikki til hjá Heilsutrygd at lýsa eitt kommunulæknastarv leyst til fasta setan, tá ein kommunulækni longu er í starvinum. Tað ber heldur ikki til hjá Heilsutrygd at lýsa eitt kommunulæknastarv leyst til fasta setan, tá kommunulæknin í starvinum er í farloyvi úr fasta starvi sínum.

Eftir ætlan verður komandi Sandoyartunnilin tikin í nýtslu í desember 2023. Fasta sambandið millum Sandoynna og Streymoynna fer at hava við sær nýggjar og higartil ótroyttar møguleikar fyri bæði kommunulæknaskipanina í Sandoynni og fyri oynna sum heild.

Heilsumálaráðið, 11. juni 2021

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður